## Nógv tóm flogsetur

Atlantsflog er kanska eitt undantak, tí sambært evropeiska loftferðslufelagsskapinum AEA var 2008 eitt vánaligt ár hjá teimum evropeisku flogfeløgunum. 11 av teimum 32 limunum í felagsskapinum siga, at tey høvdu færri ferðafólk í fjør enn í 2007. Tilsamans fluttu feløgini 366 milliónir ferðafólk í fjør, og í meðal stóðu 24 prosent av flogstólunum tómir. Størstu afturgongdina hevði italska felagið Alitalia, sum hevði 26,1 prosent færri ferðafólk í fjør enn



## SIC kring Evropa

Í dag verður fyrsta framførslan í umfatandi rundferðini hjá SIC. Føroyski heavy metal bólkurin SIC er farin undir eina umfatandi rundferð kring Evropa, og fyrsta framførslan verður í dag í Bergen. Framførslurnar á rundferðini eru yvir fimmti í talið, og talan er um fýra lond, ið SIC vitjar komandi mánaðirnir.

# Føroyum

verja borgaran, kann hava við sær, at ein óheppin triðipartur fær hendur á upplýsingunum.

### Bankin verjir upplýsingarnar

Hendan kritikkin av goymsluni hjá bankunum dugir Janus Petersen, formaður í Felagið Føroyskir Peningastovnar, ikki at skilja.

- Upplýsingarnir vera goymdir í bankanum, soleiðis, at vit kunnu vera púra vís í, hvørjir kundarnir hjá okkum eru. Hetta kann tykjast formalistiskt, at vit í einum so lítlum samfelagið skulu prógva, hvørji vit eru, men soleiðis er reglurnar allastaðni í heiminum, og peningastovnarnir kunnu fáa trupulleikar, um teir ikki hava upplýsingarnar, sigur Janus Petersen. Hann vísir eisini á, at bankin bara fylgir lógini, og tí skal hava hesar upplýsingarnar.

- Vit goyma upplýsingarnar trygt, og tað er bara, tá vit skulu boða frá óreglusemi, at vit nýta hetta veruliga, og so eisini tá fíggjareftirlitið skal gera kanningar av okkum, sigur formaðurin í Felagnum Føroyskir Peningastovnar.

### Vildu sloppið undan

Janus Petersen vísir á, at hendan lógin í veruleikanum bara gevur bankunum eykaarbeiði.

- Vit vildu heldur enn fegnir sloppið frá, men tá lógin er komin, so mugu vit fylgja henni, sigur hann. Samstundis vísir formaðurin á, at bankarnir longu nú byrja at fáa trupulleikar av, at teir ikki hava hesar upplýsingar.

- Tá vit eru í kontakt við aðrar bankar, so kemur tað ofta fyri, at vit verða spurdir, um vit hava implimentera hesa lógina, tí álitið til bankar, sum ikki hava hesa lóg er sera lítið, staðfestir hann.

### Eftirlit er allastaðni

Hóast tað kann tykjast tungt at avreiða so nógvar upplýsingar, so skilur Janus Petersen hetta als ikki.

- Hetta er ikki verri enn nakað annað. Vit vísa samleikaprógv næstan allastaðni, og er onki galið, so skuldi ikki verið nakað at verða bangin fyri, sigur hann. Hann leggur afturat, at bankin longu hevur næstan allar hesar upplýsingar og meira afturat, so fólk skulu ikki vera bangin.

Hann leggur somuleiðis stóran dent á, at bankaskipanir í einum landi ikki verða góðkendar, um hesar reglur ikki eru galdandi, tí pengastreymar eru týdningarmiklir, tá talan er um fígging til yvirgangsvirksemi.

## Lógarfestir spurningar

Sosialurin tekur støði í spurnarblaðnum frá Eik. Tó er lítil munur á spurningunum frá banka til banka, hóast Føroya Banki eisini hevur ein spurning, har teir ynskja at senda kundum sínum lýsingartilfar. Hetta við lýsingum, hevur onki við hesa lógina at gera, men við nýggju marknaðarføringslógina.
Niðanfyri eru tilvísingar og frágreiðingar til spurningarnar. Lógin talan er um kallast: LOV OM FOREBYGGENDE FORANSTALTNINGER MOD HVIDVASK AF UDBYTTE OG FINANSIERING AF TERRORISME, sum kom í gildi í Føroyum 1. juli 2008

Avrit av passi ella koyrikorti: Hetta stendur í vegleiðingini frá fíggjareftirlitinum. Har sendur, at samleikin skal skjalprógvast við passi ella koyrikorti. Hetta er ikki skrivað í lógini, men fíggjareftirlitið arbeiðir eftir sínum treytum.

**Navn:** Lógarkrav

**Bústaður:** Lógarkrav

**p-tal/passnummar:** Lógarkrav

**Telefon, fartelefon og teldupostur:** Ikki krav lógarkrav

**Tjóðskapur:** Har skal mann skriva, hvar mann er føddur, tí tað er spurt um føðistað og ikki tjóðskap í vegleiðingini frá Fíggjareftirlitinum

**Skattskylda:** Ikki lógarkrav

**Starv:** Ikki lógarkrav

**Politiskt útsettur persónur:** Ikki lógar krav

**Endamál við bankasambandinum:** Lógarkrav

**Um mann regluliga setir yvir 10.000 krónur inn:** Lógarkrav og kann geva trupulleikar við bankanum

**Væntaður umsetningur:** Lógarkrav og kann geva trupulleikar við bankanum

**Flyta pengar kontant:** Lógarkrav og kann geva trupulleikar við bankanum

**Upplýsingar um 3. mann:** Lógarkrav

# Stórur aktivitetur skapt gott úrslit

**Orsøkin til góða úrslitið hjá okkum í fjør er tann stóri aktivitetur, sum felagið hevur havt, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways**

ROKNSKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hóast sera vánalig útlit fyri búskapin sum heild og flogferðslu serliga, hevur Atlantic Airways megnað at fingið eitt eftir umstøðunum framúr gott úrslit. Smáar 20 milliónir í avlopi má sigast at vera eitt ógvuliga gott úrslit.

Stjórin í felagnum er eisini væl nøgdur við úrslitið, sum hann sigur stavar frá øktum aktiviteti í fjør.

- Aktiviteturin var munandi størri í fjør enn undanfarin ár. Vit hava framleitt nógv meira. Flogtímarnir eru øktir við 3.400, og tað svarar til alt tað, vit flugu í 2004 tilsamans. So tað sigur seg sjálvt, at tá vit økja aktivitetin so nógv, sæst tað aftur, sigur Magni Arge.

Tað er serliga avtalan við SAS um at flúgva til tær destinatiónir, sum danska flogfelagið fleyg til við illa lýddu Dash-8 flogførunum, sum hava gjørt ein stóran mun.

- Grundraksturin batnaði sera nógv í fjør, og tað sæst aftur í úrslitinum hjá okkum, sigur Magni Arge.

Starvsfólkatalið er eisini munandi økt í sambandið við økta aktivitetin – har sáttmálin við SAS var ein stórur postur – úr 192 ársverkum upp í 277. Hetta talið fer tó at minka aftur, tá sáttmálin við SAS gongur út seinni í vár.

### Trimma til tíðirnar

- Soleiðis sum útlitini er í løtuni, má roknast við væl minni aktiviteti í ár enn í fjør, og tí ræður um at trimma fyritøkuna til versnandi tíðir. Men eg haldi, at vit standa rættiliga væl brynjaðir at taka ímóti verri tíðum, tí bæði egnpeningurin og serliga gjaldførið er munandi betri nú, enn tað hevur verið, sigur Magni Arge.

Og júst hetta hevur Atlantic Airways lagt stóran dent á at betra, nú felagið hevur havt munandi størri aktivitetir. So nú er bæði eginpeningur og gjaldføri tvífaldað.

- Vit hava alla tíðina vitað, at sáttmálin við SAS var tíðaravmarkaður, og vit hava onga trygd fyri, at fáa ein nýggja sáttmála at seta í staðin. Men tá hesin sáttmálin rennur út, kunnu vit lata tvey flogfør aftur til British Aerospace, hagani vit hava leigað tey, sigur Magni Arge.

Hann sigur, at felagið alla tíðina er úti um seg, men at minkandi eftirspurningur ger tað trupult at halda ein høgan aktivitet.

- Tað ræður um at laga seg til umstøðurnar og at klára seg við minni. Men samstundis er neyðugt, alla tíðina at vera klárur, tá møguleikarnir stinga seg upp. Og í verri tíðum eru bankarnir ikki so altráðir eftir at lána pening út, og tí er tað av so sera stórum týdningi, at vit hava megnað at økt munandi um eginpeningin og serliga gjaldførið, sum er alt avgerandi í slíkum tíðum, sum vit nú eru í, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantic Airways.



*Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways, og Christian Andreasen, nevndarformaður, eru væl nøgdir við úrslitið hjá felagnum, sum var stak gott hóast truplar tíðir*

*Mynd: Jens Kristian Vang*